**Semja millum**

**Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

**2018**

Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober 2017 til 1. oktober 2019.

Semjan byggir á ein karm, sum er 2,3 % fyrra árið og 2,5 % seinna árið.

**§ 2 Setan**
§ 2, stk. 1. Strika í føroyskum blaði, vit halda okkum til at lýst verður alment.

**§ 6 Løn**
Vaktargjøldini samb. stk. 3 verða broytt soleiðis, at tey galdandi frá 1. okt. 2017 verða roknaði við 15% av tímalønini av stig 2, meðan vaktargjald 2 er tað dupulta av vaktargjald 1.

**§ 10 Eftirlønarskipan**
Tann 1 oktober 2017 hækkar eftirlønin úr 8,5% upp í 10,5%.
Tann 1. oktober 2018 hækkar eftirlønin úr 10,5% upp í 12,5%.

**§ 13 Uppsøgn**
Fyrisitingarligu reglurnar eru galdandi, tí ynskist niðanfyristandandi orðing í stk. 4 strikað. "Stk.4. Verður starvsfólk sagt at fara úr starvi, og er orsøkin eftir felagsins metan ógrundað, tá eiga KAF og FSN at taka málið til samráðingar og avgerðar millum sín.

**§ 14 Sjúka**
Stk. 3 Broyta setningin "varar sjúkan meira enn 2 vikur, kann tað verða kravt, at starvsfólkið útvegar upplýsing frá lækna um, hvussu drúgv sjúkan væntandi verður. Sum nú er stendur ætlandi.

**§ 18 Gerðarrættur**
Flyta hesa greinina longur niður í sáttmálan, so hon framyvir verður § 22, hinar greinarnar vera so ávikavist nr. 21, 20, 19, 18.

**§ 19 Brúk av egnum bili**
Stika síðsta brot "fyri nýtslu av egnum bili verður goldið havnarmeistara/havnarumsjónarfólki endurgjald, sum FSN og KAF semjast um" er eisini ásett í § 22.

**§ 19 Skeiðvirksemi**
Stk. 1. Fyri skeið, sum leiðslan áleggur starvsfólkunum at luttaka á, verður hvør einstakur skeiðdagur roknaður sum 1 vanligur arbeiðsdagur, tó í mesta lagi 8 tímar. Um skeið liggur á degi, har starvsfólkið longu hevur arbeitt tímanormin, verður skeiðtíðin tald við í skyldugu arbeiðstíðina, tó við hægst 4 eykatímum útyvir dagtímanormin. Um skeið liggur í vikuskifti ella á føstum frídegi eftir § 7, verður latin tímasamsýning fyri ólagaligu tíðina, samb. § 6.

Stk. 2. Fyri skeið, sum liggja uttan fyri vanligu arbeiðstíðina, og sum eru ikki áløgd, kann stovnurin lata aðra frítíð tíma fyri tíma í staðin fyri tíðina, ið er nýtt til skeiðluttøku.

Stk. 3. Ferðing til skeið, sum liggja aðrastaðni enn vanliga arbeiðsstaðið (uttanbíggja og í útlondum), verður roknað í skeiðstíðina.

Stk. 4. Ásetingarnar í stk. 1-3 kunnu við avtalu millum starvsfólk og arbeiðsgevaran frávíkjast, men ger tílík avtala, at arbeiðsplássið verður stillað verri arbeiðsliga ella kostnaðarliga, skal Kommunala Arbeiðsgevarafelagið góðkenna hana.

**Fakfelagsarbeiði**
Nýggj § 23 (verandi § 23 verður til § 24).
Um Havnameistari/havnaumsjónarmaður er valdur í nevnd felagsins, so skal honum verða givin heimild at fremja felagsarbeiði í vanligu arbeiðstíðini í givnum føri, t.d. undir sáttmálasliti, sáttmálasamráðingum og arbeiðsósemju. Semja skal tó í hvørjum einstøkum føri vera millum arbeiðsgevaran og felagið, um tørvin á slíkum arbeiði. Formaðurin í felagnum ger arbeiðsgevaran/stovnin varugan við hesi viðurskifti í hvørjum einstøkum føri.

Sáttmáli og lønartalvur eru dagførd sambært omanfyristandandi.

**Avtalur**
Sáttmálapartarnir eru samdir um nýggja avtalu um fráboðanarform- og fráboðanarfreist. Sí hjáløgdu avtalu.

Sáttmálapartarnir eru samdir um í sáttmálaskeiðinum at gera eina avtalu um tey undantøk, sum skulu galda, tá ið lýst verður við verkfalli ella verkbanni.

Í sáttmálaskeiðinum binda partarnir seg til at kanna, hvørji eftirútbúgvingarskeið eru neyðug fyri at halda útbúgvingina viðlíka.

*Tórshavn tann 4. juli 2018*

*Føroya Skipara- og Navigatørfelag* *Kommunala Arbeiðsgevarafelagið*